

*Danskir miðlar hava gjørt nógv burtur úr nýggju bókmentasendingini, Edmund S. Jacobsen er partur av. Politiken setti eina heila síðu av til tað, meðan TV Avisen hjá DR1 gjørdi eitt innslag, har Edmund var við, umframt at útvarpsrásin P1 hevði ein heilan tíma um sendingina.*

*Edmund S. Jacobsen við yndisbókini »Gå eller kunsten at leve et vildt og poetisk liv« í hondini, meðan íbúðarblokkurin, har Edmund í dag hevur íbúð, hómast aftanfyri høgrumegin*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

## Fakta

Edmund S. Jacobsen er hoyvíkingur og 41 ára gamal. Hann býr í eini íbúð á Amager í Keypmannahavn, men hevur áður verið heimleysur. Klokkan tíggju í kvøld verður hann at síggja í nýggjari sjónvarpsrøð á DR2, har hann saman við trimum øðrum heimleysum fer at ummæla bøkur. Sendingarnar hava Michael Bertelsen og Mads Brügger gjørt. Teir hava áður gjørt sendingar sum Den Elvte Time, De Uaktuelle Nyheder og Quatraro Mysteriet.